Vit eru:

Bára Sólheim Guttesen, í starvi hjá Føroya Pedagogfelag í 15 ár
Birita Hammer Jacobsen, í starvi hjá Føroya Pedagogfelag í 11 ár.

Leikluturin sum hjásiti.

# Skrá fyri ídag

- Fara at tosa um tað at verða hjásiti
- Fyri at røkja ta uppgávuna til lítar, slepst ikki undan at nema við evnini:
- *Tann torføra samrøðan*
- *Ósemjuhandfaring*
- *Samskifti*
- Tvey bólkaprát.
- Tit eru vælkomin at seta spurningar leypandi

# Lógargrundarlag

- Rætturin til hjásita hevur heimild í §8 í fyrisitingarlógini:

- ***§ 8.*** *Hann, sum er partur í einum máli, kann til eina og hvørja tíð, tá málið verður viðgjørt, lata seg umboða av øðrum ella fáa hjálp frá øðrum. Myndugleikin kann tó krevja, at parturin perónliga er við, tá tað er av týdningi fyri avgerðina í málinum.*
- *Stk. 2. Ásetingin í stk. 1, 1. pkt. er ikki galdandi, um so er, at áhugi partanna í at lata seg umboða ella vera hjálptur má metast at eiga at víkja fyri munandi umhugsni fyri almennum ella privatum áhugamálum, ella har annað er ásett við lóg.*



# Kut úr álitisfólkaavtaluni hjá Starvsfelagnum

- https://www.starvsfelag.fo/regluverk/reglugerd-fyri-alitisfolk/
- Har tað starvast 5 limir - rætt at velja sær eitt álitisfólk
- Úr §3 í sáttmálanum:
- *Stk. 5. Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir o.a., ið eru galdandi fyri arbeiðsplássið sum heild, verða yvirhildin, og skal virka fyri best møguligum samarbeiði limanna og leiðslunnar millum.*
- *Stk. 6. Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum hava týdning fyri starvsfólkið og stovnin. Er álitisfólkið ikki nøgt við avgerð leiðslunnar, skal tað leggja málið fyri felagið.*
- *Stk. 7. Tá ið talan er um at flyta ella siga upp starvsfólk, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi deild. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.*
- *Stk. 8. Tá ið talan er um at seta starvsfólk, skal álitisfólkið hava málið til ummælis, áðrenn endalig støða verður tikin.*

# Framhald

- *Vit mæla til, at álitisfólk royna at fáa eitt gott samskifti við leiðsluna í mun til trivnaðin á stovninum. Kunnu eisini samskifta við trygdarumboðið í mun til trivna.*
- *Heimasíðan hjá arbeiðs og brunaeftirlitinum hevur góðar vegleiðingar um sálarliga arbeiðsumhvørvið – samrøður o.a., har tit kunnu verða biðin við sum hjásitar: https://arb.fo/arbeidsumhvorvi-vegleidingar*

# Hvør kann vera hjásiti

- Hjásiti skal vera yvir 18 ár
- Viðkomandi, sum skal hava hjásita, má hava álit á hjásita bæði fakliga og menniskjansliga.
- Stovnurin má hava álit á hjásitanum
- Oftast er tað álitisfólkið, sum er hjásiti (hetta mæla vit til), og um ógegni ella aðrar umstøður forða fyri hesum, kann ein heita á varaálitisfólkið ella onkran annan. Í summum førum, kann tað verða neyðugt at brúka umboð frá felagnum av ymsum orsøkum.
- Ein kann altíð velja sín egna hjásita. Gott er at boða arbeiðsgevaranum frá, hvør er hjáisiti.

# Samrøður har ein hjásiti er neyðugur

- Setanarsamrøður - setanarpolitikur landsins mælir til, at álitisfólk eru við til setanarsamrøður.
- Bygnaðarbroytingar, sum hava við sær broytingar í starvinum hjá starvsfólkinum, krevja hoyring
- Atfinningarsama samrøðan – leiðari, sum vil finnast at starvsfólki í t.d. ikki at møta til tíðina, samstarvstrupulleikar ella vantandi fakligar førleikar.
- Ávaringar – munnligar og skrivligar (tá skjalið skal handast)
- Uppsagnarmál – hoyring/sakligtheit/grundgeving/innlit/proportionalitet
- Sjúkrafráverusamrøður/umsorganarsamrøður.
- Hetta merkir **ikki**, at ein hjásiti er neyðugur í vanliga dagliga samskiftinum við leiðsluna.

# Evnir fundur kann verða um

- Flyta starvsstað og/ella bygnaðarbroytingar
- Ónøgdsemi við arbeiðsavrikið, væntandi førleikar til starvið
- Samstarvstrupulleikar
- Samskiftisháttur
- Órøkinskapur
- Klagur
- Útbúgvingarlongd sum dregur út
- Langtíðarsjúka - umsoganarsamrøða
- Ovurnýtsla av alkohol ella øðrum
- Starvsfólk, ið møtir ov seint

# Týdningarmiklar uppgávur hjá einum hjásita – fyrireiking - fyrireiking - fyrireiking

- Áðrenn fundin
- Undir fundinum
- Aftaná fundin



# Áðrenn fundin

- Fyrireking áðrenn fundin hevur alstóran týdning.
- Hav ein "undanfund" við starvsfólkið og legg eina ætlan - hvør førir orðið, hvør tekur notur og tosa um møguleikan at taka ein "time-out" á fundinum
- Tryggja, at ein greið skrá fyriliggur, og viðkomandi persónur er kunnaður og skilir evnið, sum er á skrá
- Spyr arbeiðsgevaran hvør er við á fundinum, so tit vita hvør er har
- Um ivamál eru, spyr fakfelagið og/ella løgfrøðing
- Tosa um, hvørt fundurin kann vera eitt mál, ið fær starvrættarligar fylgjur
- Um ivamál er um hvat evnið er á fundinum – bið leiðsluna um útdýping
- Kanna fakta í málinum (kennir starvsfólkið seg aftur í tí, sum er á skrá)
- Tosa um atburð á fundinum – lurta – ikki leypa á ......



# Fundarvirksemi

- Halt ongantíð fundir av slíkum slag ein fríggjadag.
- Starvsfólkið eigur at hava møguleika fyri at venda aftur til arbeiðsgevaran dagarnar eftir slíkan fund, og fáa svar uppá møgulig ivamál.

# Time out

- Tá starvfólkið og álitisfólkið fyrireika fundin, er gott at upplýsa um møguleikan fyri at taka time out á fundinum.
- Hetta kann vera neyðugt, um tað gert "óbehagiligt", tí fólk kunnu verða kedd, ill og/ella bangin. Tað kann skapa tørv á at taka ein steðg á fundinum.
- Time out kan eisini brúkast til at kanna møgilig ivamál í baklandinum (fakfelagið), ella fyri at gjøgnumganga eitt møguliga móttikið skriv.



# Á fundinum

- Starvsfólkið og álitisfólkið fara inn saman og út av fundinum saman!
- Greið frá, at tú ert við sum hjásiti, og bið um at fáa upplýst nøvn og hvønn leiklut hini fólkini á fundinum hava (um ivamál eru um tað).
- Tryggja, at skráin verður fylgd. Um okkurt annað evnið stingur seg upp, bið um ein nýggjan fund um tað.
- Lurtið eftir hvat arbeiðsgevarin hevur at siga.
- Lurta og tak frásøgn/notur



# Á fundinum - framhald

- Spyr um so nógv fakta um málið sum gjørligt
- Hvørji brot eru framd, sum kunnu vísast til lógir/reglur (fakta)
- Er nakað skjalprógv fyri pástandunum – vitnir ella skjøl
- Bið um time out, um støðan/samskiftið fer av sporinum, ella um okkurt skal samskipast øðrvísi.



# Á fundinum - framhald

- Royn og skáka undan ósemjum og varðveit friðin (ikki øsa seg), tí um tú leggur teg ov nógv uppí – kann tað ávirka soleiðis, at tú ikki ert ein góður hjásiti.
- “Altíð og øll” ákærandi samskifti – ikki uppbyggjandi
- Tak ikki avgerðir á fundinum, uttan heimild frá starvsfólkinum. Sig heldur, at tit venda aftur, so starvsfólkið fær umhugsunartíð.
- Áðrenn fundurin endar, tak samanum og tryggja, at partarnir hava felags fatan av møguligum niðurstøðum og avtala greitt, hvat skal henda aftaná.
- Bið um avrit av fundarfrásøgnini hjá arbeiðsgevaranum – til viðmerkingar.



# Tosið um útlit og ynskir

- Kann fiskurin setast aftur í vatnið?



# Aftaná fundin

- Tak samanum saman við starvsfólkinum, hvat varð sagt/avtalað
- Send møguliga tykkara frásøgn til arbeiðsgevaran – (tann ið tegir samtykkir)
- Tryggja tær, at starvsfólkið fær greidleika um hvat hendi og varð sagt á fundinum – og vegleið um møguligar avleiðingar.
- Met um møguligar avtalur (uppfylging  v.m.)
- Ger greiða avtalu um næsta stig í málinum.
- Um ivamál eru, set teg í samband við fakfelagið.
- https://fiu-mikrolaering.dk/mikrolaering/bliv-en-bedre-bisidder/

# Tagnaðar- og loyalitetsskylda

- Álitisfólk hava tagnaðarskyldu um alt, sum kemur fram á fundinum, bæði skjøl og tað sum verður sagt.
- Álitifólkið eigur eisini at vera loyalt mótvegis starvsfólkinum, viðkomandi er hjásiti hjá. Hetta merkir ikki, at álitisfólkið neyðturviliga er samt í tí,  sum viðkomandi møguliga hevur gjørt, men hevur skyldu til at tryggja, at alt fer rætt fram, soleiðis, at starvsfólkið verður rætt viðfarið smb. galdandi reglum/lógum.

# Kenna tit nakað aftur?

- Hvørjar avbjóðingar hava tit havt sum hjásiti?
- Hvat riggaði og hvat riggaði ikki?
- Er tað torført at verða hjásiti/hví?

# Torføra samrøðan

- Kanna hvat liggur til grund fyri at hava samrøðuna og hvørjar ætlanir arbeiðsgevarin hevur. SPYR (ikki leiðandi spurningar)
- Sum hjásiti ert tú við sum eyka eygu og oyru
- Sum hjásiti skalt tú kanna og spyrja, ikki ákæra og leypa á!
- Tað er í lagi ikki at vera serfrøðingur, tí skalt tú spyrja, kanna og biðja um skjalprógv.
- Royn at notera øll svarini tú fært.
- Eyðmjúk spyrjan – at spyrja á ein hátt, sum ein ikki kennir svarið frammanundan. Relatión og forvitni.
- Týdningarmikið ikki at bíða ov longi.



# Torføra samrøðan – áðrenn

- Kanna fakta og regluverk, sjúka, møtitíðir, samstarvstrupulleikar v.m.
- Hav eina samrøðu við starvsfólkið áðrenn og "avstemma" leiklutabýtið.
- Kennir viðkomandi seg aftur í "ákærunum"
- Hví hevur tað týdning fyri arbeiðsgevaran at hava hesa samrøðu
- Hvat vil arbeiðsgevarin hava burturúr samrøðuni
- Hvat vil arbeiðgevarin hava broytt
- Hvat skal til fyri, at samrøðan skal eydnast væl fyri viðkomandi
- Hvørjar avleiðingar kann tað fáa, um samrøðan ikki eydnast væl

# Torføra samrøðan - til samrøðuna

- Arbeiðsgevarin eigur skjótast gjørligt at orða orsøkina til, at starvsfólkið er biðið um at koma á fund, umframt hvat arbeiðsgevarin vil hava burturúr fundinum.
- Orða teg greitt og neyvt, so misskiljingar ikki koma fyri.
- Vís nærveru undir samrøðuni og lurta eftir, hvat arbeiðsgevarin sigur.
- Vís á, at tit ynskja at samstarva, og, at felags uppgávan hjá tykkum er at tryggja góð arbeiðsviðurskiftir. Møguligt inntriv/avgerð eigur ALTÍÐ at vera tað minst víðfevnda / proportionelt.
- Tosa virðiliga og ver erlig/ur. Á tann hátt koma tit lættari til eina loysn.
- Ver ítøkilig/ur í samrøðuni og kom við nágreiniligum dømum um tað, ið skal broytast.

# Torføra samrøðan - aftaná

- Skriva frásøgnina - helst beint eftir samrøðuna, so tit fáa eina felags mynd av innihaldinum í samrøðuni.
- Skriva møguligar avtalur tit hava gjørt niður, so sum hvør ger hvat, nær og hvussu, og um samrøðan skal fylgjast upp.
- Náddu tit endamálinum við samrøðuni í mun til fakta og reglur?
- Vóru ítøkiligar avtalur gjørdar við starvsfólkið og arbeiðsgevaran?
- Komu møguligar avleiðingar greitt fram undir samrøðuni?

# Ósemjuhandfaring

- Halt teg til evnið og set innbjóðandi spurningar, ikki verða persónligur móti arbeiðsgevaranum. Brúka "eg mál" og brúka ikki ov nógvar hví, hvussu og hvør spurningar – hygg t.d. eftir vegleiðing um Karl Tomms spurningar: https://fiu-mikrolaering.dk/karl-tomms-spoergsmaalstyper/story.html
- Tit mugu handfara og hava tamarhald á kenslunum. Royn og slepp undan, at frustratiónir og øði ávirka fundin. Tak heldur ein time-out, um tørvur er á tí.
- Gev rásarúm í samrøðuni, so arbeiðsgevarin fær tosað. Spyr inn til hvørjir tankar liggja aftanfyri, so støðan verður væl lýst fyri starvsfólkinum.
- Minst til at halda sjóneyku á evnið.



# Samskifti

- Mál og persónur eigur at haldast sundurskilt, t.v.s., at sjóneykan skal vera á ósemjuni og ikki á vantandi vitan og førleikar.
- Spyr forvitin um sjónarmiðini hjá arbeiðsgevaranum "Tá tú sigur soleiðis, skulu vit so skilja tað soleiðis at...."
- Royn og set teg inn í sjónarmiðini hjá arbeiðsgevaranum, hvat hevur týdning fyri viðkomandi.
- Ikki hava fokus á hvør hevur skyldina, men orða heldur hvat kundi verið ynskiligt fyri starvsfólkið og arbeiðsgevaran.
- Kanna møguleikan fyri ymiskum loysnum, sum at síggja til kann vera ein góð loysn fyri báðar partar.

# Leinkjur

- https://fiu-mikrolaering.dk/mikrolaering/bliv-en-bedre-bisidder/
- https://fiu-mikrolaering.dk/mikrolaering/spoergsmaalstyper/
- https://www.foa.dk/raad-regler/opsigelse-afskedigelse/tr-opsigelse/tr-amr-guide-bisidder-tjenstlig-samtale-tre-faser
- https://ida.dk/faellesskaber-og-frivillige/tillidsvalgte/tjekliste-til-dig-der-skal-vaere-bisidder
- https://www.fagbladetfoa.dk/Artikler/2019/02/14/Kend-din-ret-6-ting-du-skal-vide-inden-tjenstlig-samtale

# Takk

- Takk fyri ídag, og bestu eydnu í tykkara virki sum hjásitarar.
- Tit hava ein týdningarmiklan leiklut sum álitisfólk!

